# Oddagrein



Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

# SO TRÝSTI RÓSA Á »RESTART«

Tað var tann 25. juni, at Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, her í blaðnum gjørdi greitt, at hann og Javnaðarflokkurin ikki fóru at taka undir við ætlanunum hjá Rósu Samuelsen um at leggja niður nøkur røktarpláss, tá nýggj røktarheimspláss verða tikin í nýtslu.

Í sambandi við fíggjarkarmin, sum løgtingið hevur samtykt, varð gjørt greitt, at hon skuldi spara 30 milliónir krónur. Ein part ætlaði hon at spara við at leggja niður nøkur røktarheimspláss, tá nýggju røktarheimini, sum eru í gerð, verða tikin í nýtslu. Júst hetta við at útvega fleiri røktarpláss er eitt mál, sum Javnaðarflokkurin hevur koyrt hart uppá, og tí valdu vit seta flokkinum spurningin, um hann tók undir við hesum.

Eitt sindur av orðadrátti varð aftur um hetta málið stutt fyri ólavsøku – men í ólavsøkurøðu løgmans tekur hann uppaftur ætlanina hjá Rósu Samuelsen.

Men nú er vent í holuni. Gjáramorgunin sendir Rósa Samuelsen út eitt tíðindaskriv, har hon ger greitt, at hendan ætlanin er slept. Hon harmast um, at tey ongantíð náddu at seta seg rundan um borðið og viðgera ætlanirnar, sum í staðin skaptu miklan ruðuleika. Hon segði í tíðindaskrivinum, at hon tekur til eftirtektar støðuna hjá samgongufeløgum hennara og steðgar málinum.



Umframt tær 12 milliónirnar, sum hon sparir við at taka av javningina av pensjónunum, so skal hon framvegis spara 18 milliónir krónur, sum skulu finnast fyri 1. oktober. Rósa Samuelsen segði í morgun, at hon umhugsar at endurskoða bygnaðin innnan almannaøkið. Hetta merkir helst uppsagnir – og hon sigur eisini, at allar dupultfunktiónir skulu samskipast fyri at fyribyrgja óneyðum útreiðslum, og at hvør króna skal vendast, og at tryggjast skal, at peningurin verður brúktur til røttu endamál.

Tað tykist sum um landsstýriskvinnan er gyrd í brøkur við hesum spariætlanum – sum eru misnydnaðar. Hon sigur sjálv, at hon skal trýsta á »restart«. Vit kunnu so bert vóna, at »restart« ikki merkir plenuklipparin einaferð enn, tí so verður galið.

Tað er ikki ein løtt uppgáva, sum bíðar Rósu Samuelsen. Men hon verður noydd at velja og at raðfesta – tí, sum hon sigur: »*Framhaldandi er aðalmálið, at tænasturnar til borgaran skulu skerjast sum minst. Neyðugt er at hyggja gjølla eftir tí umsitingarliga partinum, áðrenn tænastustøðið verður lækkað...*«

## » Bara 'restart' ikki merkir plenuklipparin

# Lata av ognum sínum

34 amerikanskir milliarderar hava avgjørt at gera sum Warren Buffet og Bill Gates, sum hava gjørt av at lata helmingin av pengum sínum til vælgerandi endamál.

Avgerðin kemur í kjalarvørrinum av, at teir báðir amerikansku hópmilliarderarnir í juni fóru undir eina herferð til tess at fáa milliarderar at býta út av pengum sínum.

Millum teir milliarderar, ið taka undir við Buffett og Gates, er borgarstjórin í New York, Michael Bloomberg, Barry Diller, kendur úr undirhaldsvinnuni, Larry Ellison, sum var við til at stovna Oracle, T. Boone Pickens, kendur orkumaður, Ted Turner, sum hevur verið við til at seta CNN á stovn og David Rockerfeller og íleggjarin Ronald Perelman.



Buffett, sum er íleggjari, og Gates, sum setti Microsoft á stovn, hava biðið fleiri hundrað amerikanskar milliarderar um at býta helmingin av ognum sínum til vælgerandi enamál.

Buffett og Gates kalla herferðinga The Giving Pledge - lyftið um gávu. Endamálið er, at ríku amerikanarar gjøgnum lívið ella eftir deyða teirra lata helmingin av pengum teirra til stuðul ella vælgerandi endamál.

Warren Buffett, sum er ein av kendastu ríkmonnum í USA, sigur á síni heimasíðu, at hann »kundi ikki verið eydnuríkari« av síni avgerð í 2006 um at lata 99 prosent av síni persónligu ognum til stuðulsgrunnin hjá Bill og Melidu Gates og aðrar hjálparfelagsskapir.

Bill Gates og konan Melinda hava latið 28 milliardir dollarar - okkurt um 170 milliardir krónur, til teirra egna menningargrunn. Hann hevur stuðlað stórum verkætlanum í fátøkum londum, eitt nú stríð móti malaria og sosialar verkætlanir í USA.



## » Breiðastu herðar skulu bera

INGRID HENRIKSEN
KJAK Á SÍÐU 11



## » Kirkjan livir ikki av tølum

JOHN S. MYLLHAMAR
KJAK Á SÍÐU 13



# Mangla vitjunarvinir

Vitjunartænastan hjá Reyða Krossi ynskir sær fleiri vitjunarvinir. Í løtuni eru bara um 14 vitjanarvinir, og tað er ov lítið.

Vitjunartænastan virkar soleiðis, at Vitjunartænastan hjá kommununi, Heimarøktin ella onnur seta seg beinleiðis í samband við vitjunartænastuna hjá reyða Krossi við upplýsingum um fólk, sum tørva ein vin.

– Tað eru mong, sum eru einsamøll, mong teirra vita ikki um vitjunarvinirnar, og kanska heldur ikki hvønn tey skulu ringja til, siga tey hjá Reyða Krossi.

Tænastuni vantar fleiri, ið vilja átaka sær uppgávuna at verða vitjunarvinir.

Hevur hetta áhuga ber til at ringja til Eyrith hósdag fyrrapart á 319850 ella privat 313784 og 513784, ella til Marin á 314333 ella 212433.

Er onkur, ið ynskir sær vitjan, ber til eisini at ringja beinleiðis til Eyrith ella Marina.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*